

# Koppseting fyri COVID-19 - Støðulýsing

COVID-19 koppsetingaringarbólkurin

19. februar 2021

# Innihaldsyvirlit

Samandráttur ..... 3
Koppingarevnir og vørusendingar ..... 4
Koppsetingargongdin ..... 6
Koppsett higartil ..... 8
Undirtøka ..... 10
Føroyar samanborið við onnur lond ..... 11
Gagnnýtsla av koppingarevni ..... 12
Kunningartilfar ..... 14

# Samandráttur

Í Føroyum varð farið undir at koppseta fyri COVID-19 tann 30. desember 2020. Síðani tá eru tilsamans 5.355 fólk koppsett. 4.134 fólk hava fingið fyrru koppsetingina og 1.221 fólk hava fingið seinnu koppsetingina, og eru sostatt liðugt koppsett.

Í hesari støðulýsingini verður tikið samanum koppsetingargongdina higartil og løgd verða fram hagtøl, sum lýsa gongdina í tíðarskeiðinum frá 30. desember 2020 til 17. februar 2021. Hetta er fyrsta støðulýsingin av sínum slag, og COVID-19 koppsetingarbólkurin fer at dagføra støðulýsingina regluliga komandi mánaðirnar.

Hesa fyrstu tíðina hevur dentur verið lagdur á at koppseta heilsu- og røktarstarvsfólk, búfólk á ellis- og røktarheimum og sjúklingar í serligum vandabólkum og avvarðandi teirra. Hetta eru tey, sum eru í bólkunum 1, 2, 3 og 4 í koppsetingarætlanini, sum serligi COVID-19 koppsetingarbólkurin undir landsstýrismanninum í heilsumálum hevur gjørt.

Tað hevur yvirhøvur gingið væl við koppsetingini í Føroyum. Samanumtikið hevur koppsetingin gingið skjótt, undirtøkan hevur verið sera góð og gagnnýtslan av koppingarevni hevur verið høg. Ávís óvissa hevur verið um veitingarnar av koppingarevni, og tað hevur havt við sær, at koppsetingarætlanin varð tillagað eitt vet herfyri, og avgerð tikin um, at næstu sendingarnar av koppingarevni skulu brúkast til endurkoppsetingar.

Talan er tó í stóran mun um seinkingar í sendingunum. Men hóast hetta verður framvegis væntað, at øll í Føroyum, sum koppingarevni er góðkent til, hava fingið í boðið koppsetingina, og eru koppsett um mánaðarskiftið juni-juli 2021.

Tað hevur verið ein steðgur í koppsetingunum síðani 9. februar, meðan bíðað verður eftir nýggjari sending av koppingarevni. Væntandi kemur nýggj sending til Føroyar í hesi vikuni (viku 7) og koppsetingin verður tikin uppaftur skjótast gjørligt.

## Koppingarevnir og vørusendingar

### *Góðkend koppingarevnir*

Føroyar fáa koppingarevnir úr Danmark. Í løtuni eru trý sløg av koppingarevnum góðkend í Danmark. Roknað verður við, at fleiri sløg av koppingarevnum fara at verða góðkend komandi mánaðarnar. Á heimasíðunum hjá Sundhedsstyrelsen (www.sst.dk) og Lægemiddelstyrelsen (www.lmst.dk) ber til at lesa meira um koppingarevnini og hvussu tey verða góðkend at brúka til koppsetingar.

*Mynd 1: Koppingarevnir*

| | | |
|---|---|---|
| **Comirnaty®**<br><br>Tøkni | Týska fyritøkan BioNTech hevur ment hetta koppingarevnið, sum verður framleitt og marknaðarført í samstarvi við amerikonsku fyritøkuna Pfizer. Koppingarevnið til marknaðin í Evropa verður framleitt og sent frá Pfizer í Belgia. Koppingarevnið verður veitt tvær ferðir við 21 daga millumbili og í undantaksførum innan fyri 42 dagar.<br><br>Messenger RNA (mRNA) | **Góðkent 21.12.2020**<br><br>Fyrsta vørusending kom til Statens Serum Institut 26.12.2020, og kom til Føroyar 27.12.2020. |
| **COVID-19 Vaccine Moderna®**<br><br>Tøkni | Amerikanska fyritøkan Moderna hevur ment koppingarevnið saman við US National Institute of Allergy and Infectious Diseases. Koppingarevnið til marknaðin í Evropa verður framleitt í Sveis og Spania eftir avtalu við sveisisku fyritøkuna Lonza Group. Koppingarevnið verður veitt tvær ferðir við 28 daga millumbili og í undantaksførum innan fyri 43 dagar.<br><br>Messenger RNA (mRNA) | **Góðkent 6.01.2021**<br><br>Fyrsta vørusending kom til Statens Serum Institut 12.01.2021. Hetta koppingarevnið fæst ikki í Føroyum enn. |
| **COVID-19 Vaccine AstraZeneca®**<br><br>Tøkni | Bretsk-svenska fyritøkan Astra Zeneca hevur ment koppingarevnið í samstarvi við Oxford University. Koppingarevnið verður veitt tvær ferðir við 28 daga millumbili og í undantaksførum innan fyri 84 dagar.<br><br>Ikki-replikerendi virusvektor | **Góðkent 29.01.2021**<br><br>Fyrsta vørusending kom til Statens Serum Institut 6.02.2021. Hetta koppingarevnið fæst ikki í Føroyum enn. |

### *Vørusendingar*

Koppingarevnini, sum Danmark fær, verða latin Statens Serum Institut, sum síðani sendur tey til ávikavist Føroyar, Grønlands og donsku regiónirnar. Tá koppingarevnini koma til Føroyar, verða tey latin Apoteksverkinum, sum hevur tey í varðveitslu til tey verða brúkt at koppseta fólk í Føroyum.

Í mynd 2 sæst, hvussu nógv koppingarevni Føroyar hava fingið/fara at fáa í tíðarskeiðinum vika 53 í 2020 – vika 8 í 2021. Seinni í viku 7 fæst at vita, hvussu nógv koppingarevni fara at koma til Føroyar komandi vikurnar.

*Mynd 2: Vørusendingar við koppingarevninum Comirnaty®*

| | Desember | Januar | | | | Februar | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vika | 53 | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 |
| Bakki | 1 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 |

Í hvørjum bakka eru 195 gløs. Pfizer BioNTech kunnaði upprunaliga um, at tað bar til at fáa fimm skamtar av koppingarevninum úr hvørjum glasi. T.v.s., at í hvørjum bakka var nokk av skamtum til at koppseta 975 persónar. Pfizer BioNTech hevur síðani boðað frá, at tað ber til at fáa seks skamtar av koppingarevninum úr hvørjum glasi. Royndirnar hava víst, at tað hevur eydnast Sjúkrahúsverkinum í Føroyum at fáa upp í sjey skamtar av koppingarevninum úr nærum hvørjum glasi. T.v.s., at tað ber til at koppseta fleiri enn 1.300 persónar pr. bakka. Les nærri undir "Gagnnýtsla av koppingarevni".

### *Grundarlagið fyri tíðarætlanini*

Danska heilsustýrið ger javnan nýggjar forsagnir fyri komandi sendingar av koppingarevni. Sum longu nevnt fáa Føroyar burturav sendingunum til Danmarkar og tí kunnu vit vænta, at okkara tíðarætlan fyri koppsetingunum fylgir tí donsku.

Hin 15. februar greiddi Sundhedsstyrelsen frá, at góð boð vóru komin frá Pfizer, at heilivágsfyritøkan kemur at veita væl fleiri skamtir, tá ið vit koma inn í apríl. Forsøgnin sigur tí nú, at øll, sum vilja verða koppsett, skulu vænta at verða liðugt koppsett í seinasta lagi, tá vika 25 er lokin, sum er 27. juni. Tað gongur ikki seinni at koppseta í Føroyum enn í Danmark, og tí eru góðar orsøkir at halda, at vit eisini eru liðug við koppsetingarnar um jóansøkuna 2021.

## Koppsetingargongdin

Øll í Føroyum, sum koppingarevnið er góðkent til, fáa í boðið ókeypis koppseting fyri COVID-19 í ár. Í løtuni bendir nógv á, at øll hesi verða liðugt koppsett um mánaðarskiftið juni-juli í 2021.

Koppingarevnini koma til Føroya í avmarkaðum nøgdum. Hetta merkir, at tað ikki ber til at bjóða øllum føroyingum koppseting fyri COVID-19 í senn. Tí verður koppingarætlanin býtt upp í partar eftir, nær koppingarevnini koma til Føroya, sí mynd.

*Mynd: Koppsetingarkalendarin – dagførdur 10. februar 2021*



Sambært stig 1 og 2 í koppingarætlanini sær raðfestingin og tíðarætlanin soleiðis út:

| Vika | Dato | Málbólkur |
|---|---|---|
| 53 – 3 | 30. desember – 24. januar | Starvsfólk í fremstu røð |
| 2 – 13 | 11. januar – 1. apríl | Búfólk á ellis- og røktarheimum ella øðrum røktarbústaði |
| 3 – 13 | 18. januar – 1. apríl | Persónar, sum eru í serligum vanda fyri at gerast álvarsliga sjúkir, verða teir smittaðir við COVID-19. Hesir sjúklingar verða valdir út í samráð við teir sjúkrahúslæknar, sum hava ábyrgd av viðgerðini hjá tí einstaka |
| 4 – 13 | 25. januar – 1. apríl | Avvarðandi hjá persónum, sum eru í serligum vanda fyri at gerast álvarsliga sjúkir, verða teir smittaðir við COVID-19 (tað eru sjúklingar, sum verða koppsettir í viku 3 - 13) |
| 5 – 9 | 1. februar – 7. mars | Endurkoppsetingar (onnur koppsetingin) |
| 9 – 10 | 1. – 14. mars | Persónar, ið hava fylt 65 ár, sum fáa persónliga røkt og hjálp við tí praktiska |
| 9 – 10 | 1. – 14. mars | Persónar, ið hava fylt 85 ár |

Tað er Sjúkrahúsverkið, sum hevur fingið ábyrgdina av at skipa fyri og fremja koppsetingarnar sambært kunngerðini um ókeypis koppseting ímóti COVID-19. Tað er tí eisini Sjúkrahúsverkið, sum hevur staðið fyri at kalla inn og koppseta teir bólkar, ið nevndir eru í koppingarætlanini, og sum hava tikið av tilboðnum um koppseting. Hetta er gjørt í góðum samstarvi við leiðslurnar á eldraøkinum, sum m.a. hava fingið til vega yvirlit yvir tey starvsfólk og búfólk, sum ynsktu at taka av tilboðnum.

Sjúkrahúsverkið hevur sett eitt koppsetingartoymi við starvsfólkum frá øllum trimum sjúkrahúsunum, og øll koppsetingin er samskipað við eins mannagongdum tvørtur um sjúkrahúsini. So hvørt boð koma frá Landsapotekaranum um, at ein sending við koppingarevni er á veg, fáa fólk í teimum raðfestu málbólkunum, bjóðað koppseting. Nógv flest fólk eru koppsett inni á teimum trimum sjúkrahúsunum og harumframt hava flytførar eindir frá sjúkrahúsunum vitja á ellis- og røktarheimum kring landið fyri at koppseta búfólk.

Koppingarevni er komið í avmarkaðum nøgdum og vanliga hevur tað tikið 3-4 dagar at brúka alt koppingarevnið, sum hevur verið til taks. Kapasitetur er tí til at koppseta nógv fleiri enn tað verða í dag.

Arbeitt verður at menna eina talgilda bíleggingarskipan, sum vit kenna frá koronukanningunum, og hendan er um at verða klár. Í stuttum verður skipanin soleiðis, at tey, ið eiga tørn sambært koppsetingarætlanini, fáa boð gjøgnum miðlarnar um, at tey kunnu bíleggja sær tíð til koppseting á heimsíðuni www.corona.fo ella umvegis telefon. Lýst verður væl og virðiliga alment, tá skipanin verður tikin í nýtslu.

## Koppsett higartil

Fyrstu føroyingarnir vórðu koppsettir beint fyri nýggjár, tann 30. desember 2020, og tann 17. februar 2021 vóru tilsamans 5.355 koppsetingar givnar í Føroyum. Í alt 4.134 fólk, svarandi til 7,8 prosent, hava fingið fyrru koppsetingina og 1.221 fólk hava fingið seinnu koppsetingina, og eru sostatt liðugt koppsett. Hetta svarar til 2,3 prosent av fólkatalinum.

*Mynd: Koppsetingar skift á dagar*




Koppsetingarbólkurin undir landsstýrismanninum í heilsumálum hevur eyðmerkt 12 málbólkar, sum stigvíst fáa í boði at verða koppsett fyri koronu. Seks av hesum málbólkum eru fevndir av kunngerð um ókeypis koppseting ímóti COVID-19. Higartil hava fólk í fýra av málbólkunum fingið bjóðað koppseting. Tá farið verður undir at koppseta næstu bólkarnar, verður kunngerðin víðka samsvarandi.

Í talvuni niðanfyri síggjast koppsetingarnar skift á bólkar. Størsti parturin av teimum koppsettu starvast í heilsu- og røktargeiranum. Næstflest eru búfólk á ellis- og røktarheimum, síðani sjúklingar í serligum vandabólkum og útvald avvarðandi teirra.

*Talva: Málbólkar*

| Málbólkur | Fyrra koppseting | Endur-koppseting |
|---|---|---|
| Heilsu- og røktarstarvsfólk | 3.226 | 1.220 |
| Búfólk á ellis- og røktarheimum o.ø. | 586 | |
| Sjúklingar í serligum vandabólkum | 295 | 1 |
| Avvarðandi hjá sjúklingum í vandabólkum | 27 | |

Sambært Sjúkrahúsverkinum hava øll heilsu- og røktarstarvsfólk í fremstu røð fingið bjóðað koppseting. Somuleiðis hava øll búfólk á ellis- og røktarheimum á eldraøkinum fingið koppsetingina í boðið. Enn vanta búfólkini á bústovnum undir Almannaverkinum. Hesi verða eftir ætlan koppsett, tá farið verið undir aftur at koppseta.

Komið er væl áleiðis at koppseta sjúklingar í serligum vandabólkum, men hesin málbólkur víðkast støðugt og pláss er allatíð fyri, at fleiri sjúklingar leggjast aftrat hesum málbólki, so hvørt serlæknarnir á sjúkrahúsunum gera nýggjar metingar. Sama ger seg galdandi fyri avvarðandi teirra.

*Mynd: Koppsetingar skift á kyn*




At tað eru flest heilsu- og røktarstarsfólk, sum eru koppsett, sæst eisini aftur í kynsbýtinum. Tað eru fleiri kvinnur í hesum starvsbólkum og av teimum 5.355 koppsetingunum tilsamans, hava kvinnur fingið 4.355 og menn 1.000.

Verður hugt eftir aldursbýtinum sæst, at flestu fólk, sum hava tikið av tilboðnum um COVID-19 koppsetingina eru í aldrinum 50-59 ár. Teimum á baki koma fólk í aldrinum 40-49 ár og 60 til 69 ár.

*Mynd: Koppsetingar skift á aldur*




## Undirtøka

Royndirnar higartil vísa, at flest øll, sum hava fingið koppsetingina í boði, hava tikið av. Tey, sum hava borið seg undan, hava havt vanligar orsøkir til tess, so sum sjúku ella, at tey hava verið upptikin av øðrum, men hesi hava so fingið koppsetingina seinni.

Tá koppsetingin stendur almenninginum í boði fæst ein betri mynd av undirtøkuni, men ein spurnarkanning, sum Heilsumálaráðið tók stig til herfyri, vísti, at 84 prosent av føroyingum vildu koppsetast. Bara sløk 6 prosent svaraðu, at tey ikki ætla at lata seg koppseta.

*Mynd: Spurnarkanning frá Spyr.fo*



## Føroyar samanborið við onnur lond

Sambært uppgerðini hjá Our World in Data liggja Føroyar rættiliga væl samanborið við heimsins lond. Our World in Data ger upp tølini fyri koppsetingar tilsamans fyri hvørji 100 fólk.

Tann 14. februar vóru í Føroyum 11 fólk koppsett fyri hvørji 100 fólk. Fremst eru londini Gibraltar og Ísrael, sum hava koppsett umleið 75 fólk fyri hvørji 100 fólk. Í Stórabretlandi eru umleið 23 fólk koppsett fyri hvørji 100 fólk, og í USA er talið umleið 16 fólk fyri hvørji 100 fólk. Í talvuni niðanfyri síggjast tølini fyri Norðurlondini.

| **Tal av koppsetingum fyri hvørji 100 íbúgvar** | |
|---|---|
| Føroyar | 10,96 |
| Danmark | 6,99 |
| Ísland | 5,85 |
| Noreg | 5,57 |
| Finnland | 5,00 |
| Svøríki | 4,53 |

*Kelda: Our World in Data 16. februar 2021,* https://ourworldindata.org/covid-vaccinations

## Gagnnýtsla av koppingarevni

Tað er umráðandi, at so lítið koppingarevni sum gjørligt fer fyri skeyti, serliga tá nøgdin av atkomuligum koppingarevni er so avmarkað, sum hon er nú. Tað eru altíð vandi fyri spilli, tá koppsett verður, serliga, tá koppingarevni er viðbrekið og krevur serliga handfaring. At fáa so nógv burturúr hvørjari sending av koppingarevni er tað vit rópa nýtslulutfall.

Í Føroyum hava vit bert koppsett við koppingarevninum Comirnaty frá Pfizer/BioNTech. Vit hava fingið fýra bakkar við 195 gløsum hvørja ferð. Danska Sundhedsstyrelsen metir í dag, at í hvørjum glasi eru 6 skamtir á 0,3 ml, men fyrstu tíðina varð mett at tað vóru 5 skamtir í hvørjum glasi, sum framleiðarin eisini hevði boðað frá.

Tað varð skjótt greitt, at starvsfólkini í Sjúkrahúsverkinum fingu seks og sjey skamtir úr hvørjum glasi. Sum tíðin gekk fingu starvsfólkini nærum hvørjaferð sjey skamtir úr hvørjum glasi av koppingarevni frá Pfizer/BioNTech.

Vit hava í útrokningini niðanfyri brúkt somu útrokningarhættir sum Sundhedsstyrelsen, so til ber at samanbera úrslitini í Føroyum við donsku regiónirnar.

Tað merkir at nýtslulutfallið av teimum skamtum, sum komu til Føroyar áðrenn 8. januar, verða roknaðar við støði í metingini, at fimm skamtir vóru í hvørjum hettuglasi. Hetta er bert fyri fyrstu sendingina av koppingarevni. Eftir 8. januar verður roknað við seks skamtum, t.v.s. sending 2, 3 og 4 av koppingarevni.

Nýtslulutfallið verður roknað útfrá talinum av koppsettum í mun til talið av sendingum, ið vit hava fingið. Dømi: Sambært Sundhedsstyrelsen kundu vit vænta at koppseta 1.170 fólk við hvørjari sending. Í Føroyum hava vit koppsett fleiri enn 1.300 við hvørjari sending av koppingarevni.

Niðanfyri sæst hvussu nýtslulutfallið hevur verið í Føroyum samanborið við donsku regiónirnar.




| | Føroyar | Miðal í Danmark | Region Hovedstaden | Region Midtjylland | Region Nordjylland | Region Sjælland | Region Syddanmark |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ■ | 120 | 103,9 | 106,4 | 104,3 | 109,1 | 97,6 | 100,1 |

*Kelda: Vaccination mod COVID-19, statusrapport 2. februar 2021 – sst.dk.*

Nýtslulutfallið av koppingarevni er 120 prosent í Føroyum, sum samanborið við donsku regiónirnar, er høgt og merkir, at minni av koppingarevni er farið fyri skeytið. Nýtslulutfallið í Danmark er um 104 prosent. Um nýtsluprosentið í Føroyum var sum miðal í Danmark, so høvdu vit gjørt 16 prosent færri koppsetingar, sum svarar til um 850 koppsetingar.

Tað hevur týdning fyri tølini, at roknað verður við fimm skamtum fyri 8. januar og væntast skal, at tølini við tíðini minka eitt vet og koma niðurímóti 115 prosent, sum er nýtslulutfallið, tá roknað verður við seks skamtum í hvørjum glasi.

Samanumtikið er mest sum einki koppingarevni fyri koronu farið fyri skeytið. Um sæð verður burtur frá fyrstu sending, so hevur tað eydnast at fingið um 1.350 skamtir úr hvørjari sending frá Pfizer/NioNTech. Ein av orsøkunum til, at færri skamtir vóru úr fyrstu sending er, at ikki fleiri av serstøku kanylunum frá framleiðaranum vóru eftir og tað vísti seg, at tá fingu starvsfólkini bara seks skamtir úr hvørjum glasi.

*Talva: Tal av skamtum úr hvørjari sending*

| Sending | Tal av skamtum/koppsetingum |
|---|---|
| 1 | 1.306 |
| 2 | 1.351 |
| 3 | 1.345 |
| 4 | 1.353 |

## Kunningartilfar

Kunningartilfar verður framhaldandi framleitt og lagt á corona.fo, undir koppseting: https://corona.fo/203?_l=fo.

| | |
|---|---|
| Koppsetingarkalendarin | Dagførdur 10. februar 2021 |
| Kunning um koronukoppseting | Filmur um hvørjir bólkar fáa bjóðað koppseting fyrst |
| Koppseting fyri COVID-19 | Faldari til tey, ið verða koppsett |
| COVID-19 Koppingarætlan fyri Føroyar | Fyrsti partur av koppingarætlanini - Heilsumálaráðið, desember 2020 |
| **Tíðindaskriv:** | Annað prikið framskundað<br><br>Landsstýrismaðurin fult álit á koppseting<br><br>84 prosent av føroyingum vilja koppsetast<br><br>Eldri og heilsuveik næst í røðini<br><br>Við koppsetingini hómast endin á koronufarsóttini<br><br>Vaksinan er á veg<br><br>Koppseting byrjar nakrar dagar seinni enn ætlað<br><br>Koppsetingin byrjar ímillum jóla og nýggjárs<br><br>Koppingarætlanin handað landsstýrismanninum |